# Tey gera sítt egna blað

**Næmingarnir á Miðlabreytini á Argja skúla eru í ferð við at gera sítt egna blað. Fríggjamorguninn vitjaðu tey í Miðlahúsinum í Vágsbotni**

MIÐLABREYT
Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

Fríggjamorguin fekk Sosialurin vitjan av Miðlabreytini í Argja skúla. Hetta eru næmingar í 10. flokki, sum hava valt seg á Miðla- og vinnulívsbreytina at nema sær meira kunnleika um miðlar og vinnulív.

Á Sosialinum fingu tey eitt sindur at vita um, hvussu ein útgáva av Sosialinum verður til, og tey settu nógvar viðkomandi spurningar um, hvussu tað at starvast sum miðlafólk í Føroyum.

Tey eru í løtuni í ferð við at gera eitt blað – og tey vóru tí fegin at fregast, hvussa tað er at arbeiða við einum evstamarki hvønn dag. Tey hava deadline, sum tað eitur á fakmálinum, 3. oktober, meðan fólkini á Sosialinum tá høvdu einar tveir til tríggjar tímar eftir at fylla tilfar í allan leygardagssosialin.

– Við hesum blaðnum sleppa tey at royna, hvussu tað er at gera eitt blað. Tey mugu seta sær spurningar so sum, hvønn tey skriva til, hvør móttakarin er og finna út av, hvussu tey skulu skriva blaðið, um hesin ella hasin málbólkurin skal lesa blaðið, sigur Bjørg Akraberg Poulsen, sum er lærari á Miðlabreytini á Argja skúla.

Á miðlabreytini verða næmingarnir kunnaðir við ymsu miðlarnar.

– Vit viðgera bløð, lýsingar, heimasíður, film, video og mangt annað, sigur Bjørg Akraberg Poulsen.

Næmingarnir í Miðlabreytini á Argja skúla koma úr øllum framhaldsdeildunum í Havn. Tey eru 12 í tali – kanska fara vit at síggja okkurt til blaðið hjá teimum í Sosialinum í komandi mánaði?



*Næmingarnir á miðlabreytini á Argja skúla, sum vitjaðu í Miðlahúsinum í Vágsbotni fríggjamorgunin saman við læraranum, Bjørg Akraberg Poulsen*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Messell hitar upp fyri Malurt

Malurt við føroyska bassleikaranum Dia Nielsen hátíðarhalda í løtuni 25 ára føðingardagin hjá bólkinum við útgávu av eini savnsfløgu og eini lítlari konsertferð. Tá bólkurin fer á pallin í Aalborg sunnudagin, verður eisini upphitingin føroysk. Tað er Messell, sum fyrr í ár var kosin ársins singer/songwriter í Norður Jútlandi, ið fer at hita upp.

Savnsfløgan við bestu Malurt løgunum varð givin út hósdagin 15. september. Hetta er júst dagurin, tá 25 ár vóru liðin síðan fyrstu Malurt fløguútgávuna "Kold Krig". Á fløguni eru tey 21 mest minniligu løgini hjá bólkinum, umframt ein bonus DVD við nógvum upptøkum, ið ongantíð eru sæddar áður. Malurt uttan Messell hildu hósdagin útgávukonsert í einum útseldum Vega í Keypmannahavn.

Dia Nielsen man vera ein tann føroyingurin, ið hevur gjørt mest um seg í donskum tónleiki. Bólkurin Malurt við karismatiska sangaranum Michael Falck hava seinastu 25 árini vunnið sær nógvar fjepparar. Seinnu árini hevur bólkurin ikki verið so virkin m.a orksaka av, at Michael Falck hevur arbeitt nógv sum einstaklingur og sum sjónleikari.

**nud**


## Málsviðgeri til ALS

**Lýst verður við hesum eftir málsviðgera til Tryggingardeildina hjá Arbeiðsloysisskipanini**

**Um Tryggingardeildina**
Tryggingardeildin umsitur vanligan arbeiðsloysisstuðul, fiskavirkisskipanina, arbeiðsloysistrygging fyri sjálvstøðug vinnurekandi, farloyvisskipanina og Barsilsskipanina

Á Tryggingardeildini starvast 6 fólk.

**Uppgávur**
Uppgávurnar hjá málsviðgeranum verða:
- at taka sær av málsviðgerð og samrøðum í sambandi við tær uppgávur, ið deildin umsitur
- samrøður og samskifti annars við viðskiftafólk okkara
- at verða við til at tillaga og menna tænasturnar

**Førleiki**
Vit leita eftir einum persóni, sum er røkin, nærlagdur, tænastuhugaður og trívist í einum arbeiðsumhvørvi við nógvari ferð.

Tað rætta starvsfólkið hevur:
- skrivstovuútbúgving ella aðra hóskandi útbúgving
- viðkomandi royndir
- evni at arbeiða skjótt, sjálvstøðugt og við støðugum evstamørkum
- evni at arbeiða við fleiri ymiskum uppgávum samstundis
- førleikar at arbeiða eftir lógarverki
- góð samstarvsevni
- evni at samskifta bæði í skrift og talu
- góðan teldukunnleika

**ALS bjóðar**
Talan er um eitt fast starv við góðum møguleikum fyri eftirútbúgving.

Løn sambært avtalu.

Starvið verður sett skjótast gjørligt.

**Umsókn**
Umsóknir, við avriti av prógvum og møguligum viðmælum, skulu vera ALS í hendi í seinasta lagi mikudagin 21. september 2005 kl. 12.00.

Umsóknir skulu sendast til ALS, Postsmoga 3022, 110 Tórshavn, ella til teldupost als@als.fo

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Jóhan E. Simonsen, deildarleiðara , á tel. 349550 ella á teldupost als@als.fo

www.sansir.fo

ALS

ALS hevur til endamáls at veita fíggjarligan stuðul til arbeiðsleys, at virka fyri bøttum møguleikum hjá arbeiðsleysum at fáa arbeiði og at umsita arbeiðsávísing fyri føroyska arbeiðsmarknaðin. Á ALS starvast í løtuni 18 fólk. Virksemið hjá ALS er í høvuðsheitum lógarásett. Ovastu leiðsluna hevur stýrið fyri ALS, sum - eftir tilmæli frá arbeiðsgevara- og løntakarafeløgunum á arbeiðsmarknaðinum - verður valt av Føroya Landsstýri.

Arbeiðsloysisskipanin • Postsmoga 3022
FO-110 Tórshavn • Tel 349550 • Fax 349551
als@als.fo • www.als.fo



Vit søkja:

**Netumsitara**

fá nærri at vita á
www.farodane.fo

FARODANE

Brekkutún 4 - FO-100 Tórshavn - Tlf. 311414 - farodane@farodane.fo